*Finnbogi Arge í Nýriti:*

# Lýsa møguleikarnar fyri útlisiteringum

*Landsstýrismaðurin í vinnumálum sigur, í seinastu útgávuni av Nýriti, kunningarskrivinum frá Miðfyrisitingini, ætlar sær at lýsa møguleikarnar fyri útlisiteringum innan sítt málsøki, við tí fyri eygað, t gera ein lista yvir útlisiteringsmøguleikarnar og eina lóg, sum heimilar útlisiteringum*



*Landsstýrismaðurin í vinnumálum fer at kanna møguleikarnar fyri útlisiteringum og at gera eitt uppskot til eina lóg, sum heimilar útlisiteringum*
**savnsmynd.**

SVEINUR TRÓNDARSON

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur sett sær fyri, at fara kanna møguleikarnar fyri útlisiteringum innan sítt málsøki.

Hann hevur sett sær fyri at lýsa hetta fyribrigdið, sum er privatisering, men bara á ein annan hátt, enn privatisering! Úrslitið skal vera ein listi yvir tær útlisiteringsmøguleikar á hansara øki og so ein generel lóg, sum heimilar útlisiteringum.

### Ikki nógv brúkt í Føroyum

Í eini greini í seinastu útgávuni av Nýriti, kunningarskrivinum frá Miðfyrisitingini, greiðir Finnbogi Arge frá sínum ætlanum, og hann nertir eisini við hugtøkini.

Er tað eitt orð, sum kann fáa politisku sinnini í kók, so er tað tá talan fellur á privatisering. Ideologiskt er ofta stórur munur á uppfatanini av hesum hugtaki, og í flestu førum eru tað tey, sum eru vinstru megin miðjuna, sum eru ímóti, meðan tey høgru megin hava lyndið til at taka undir við privatiseringum.

Tó er tað so, at vinstraflokkarnir í Evropa - og eisini í Danmark - ikki smæðast burtur, tá tosað verður um privatisering. Eitt dømi er TeleDanmark, sum sitandi danska stjórn privatiseraði.

Her heima er minni gjørt við prvatiseringar hóast vit í seinastuni hava sæð fleiri almenn partafeløg, sum eru eitt stig á vegnum til privatiseringar.

### Útlisiteringarnar øðvísi

Finnbogi Arge staðfestir, at hugtøkini privatisering og útlisitering, ofta verða brúkt hvørt um annað, hóast stórur munur er á teimum.

Tá alment virksemið verður privatiserað, fer bæði ábyrgdin av virkseminum, sum oftast við yvir til privata felagið, men soleiðis er ikki tá talan er um útlisitering, skrivar landsstýrismaðurin.

– Við útlisiteringini liggur ábyrgdin fyri, at uppgðávan, verður loyst, hjá almenna myndugleikanum, hóast uppgávan verður boðin út til privatar veitarar at útinna. Endamálið við útlisiteringini er, at uppgávan verður loyst bíligari og betri, av tí at privattir veitarar í summum førum betri kunnu gagnnýta fyrimunir við stórrakstri og skjótari kunnu laga og samskipa uppgávurnar til broyttar fyritreytir.

Tað er ein sannroynd, at útlisiteringar verða alsamt meira brútkar í grannalondunum, serliga við tí fyri eyga at spara pening og at rationalisera ávísar almennar uppgávur.

Finnbogi Arge skrivar at royndir vísa, at almennir myndugleikar kunnu spara upp í ein triðing av útreiðslunum av ávísum uppgávum, uttan at hetta førir við sær verri tænatur fyri borgaran, men at sparingar millum tíggju og fimtan prosent eru vanligari.

### Starvsfólkið flytir við

Sum vera mann er vandin við privatiseringum og útlisiteringum ofta, at almennu starvsfólkini, sum hava havt uppgávurnar um hendi, detta niðurímillum.

Men, skrivar landsstýrismaðurin, við útlisiteringunum flyta almennu starvsfólkini við til privata arbeiðsgevaran og tey siga seg ofta fáa meiri at gera og meira skiftandi uppgávur aftur fyri í flestu førum eina hægri løn.

Hann leggur afturat, at flestu teirra samstundis eru væl ella betri nøgd við starvið eftir skiftið av arbeiðsgevara.

### Almenn kapping

Sum nevnt frammanfyri er hvørki privatisering ella útlisiteringar serlia nógv brúkt hugtøk í Føroyum. Hetta staðfestir landsstýrismaðurin eisini og hann sigur, at ein partur av osrøkini til tað kann vera avmarkaða kappingin innan tær ávísu vinnugreinarnar. Útboðið av fyritøkum, at loysa ávísar uppgávur, er ikki stórt kanska serliga tí, at tað almenna hevur gjørt arbeiði sjálvt

Aðrastaðni er kappingin størri og tí eisini betri møguleikar fyri størri effektivisering, og tí heldur Finnbogi Arge, at ein slík gongd í Føroyum kann hava við sær eina menning av føroysku virkjunum, sum á tann hátt gerast meira kappingarfør.

Harafturat kann tað hava við sær, at føroysk virkir, sum vinna almennar lisitatiónir megna at gerast kappingarfør við útlendsk virkir um uppgávur - bæði innan- og uttanlands - sum í dag verða latnar útlendskum fyritøkum, mestsum av gomlum vana.

### Økir veljast út

Sambært landsstýrismanninum í vinnumálum, eru ávís økir, sum eru serliga væl egnað til útlisitering. Almenn framleiðsla og tænastur verða nevnd sum øki, sum eru uppløgd til útlisitering, tí har ber væl til at seta krøv til dygdina á uppgávuni, hin privati skal útinna og har skal ikki brúkast stórvegis orka at kanna, um uppgávan verður røkt, sum hon skal.

Samstundis er hetta eitt øki, har vit við fyrimuni kunnu læra av royndum gjørdar aðrastaðni og á tann hátt sleppa undan barnasjúkum.

– Serliga avgerandi er, at stórt arbeiði verður lagt í at lýsa ta uppgávu, ið skal røkjast, seta krøv til privata veitaran og fylgja krøvunum upp.

Finnbogi Arge sigur, at royndir uttanlands vísa, at uppgávur innan tekniska økið og KT-økið, reingerð og viðlíkahald eru serliga væl egnaðar at útlisterra, men hann leggur afturat at listin yvir uppgávur, ið tað ber til at útlisiterað er langur.

Tí heldur hann at tað er neyðugt, at felags almennar leiðreglur verða gjørdar fyri, hvussu farast skal fram, tá uppgávur verða útlisiteraðar, og royndirnar av útlisiteringini eiga at verða savnaðar á einum stað, sigur Finnbogi Arge og hann endar við at siga, at hann væntar, at arbeiði verður liðugt, so at lógin kann fara til politiska viðgerð í komandi tingsetu.



*Privatisering er ikki eitt mál í sær sjálvum, men má gerast við góðum fyriliti til brúkaran og tað almenna, sigur Jóannes Eidesgaard*
**savnsmynd**

# Mugu fara varisliga fram

*Formaðurin í Javnaðarflokkinum heldur, at myndugleikarnir eiga at fara sera varisliga fram tá tosað verður um privatisering og útlisitering, men kortini fegnast hann um at evnið verður tikið upp*

SVEINUR TRÓNDARSON

Ideologiskt eru neyvan tveir flokkar, sum liggja longri frá hvørjum øðrum enn Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin. Hetta er galdandi í nógvum málum, men tá tosað verður um privatisering og útlisitering kemur tað í øllum førum heilt greitt til sjóndar.

Vit ringdu tí til formann Javnaðarfloksins og bóðu hann geva sítt boð upp á tað arbeiði, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum ætlar sær at gera.

### Fara varisliga fram

Jóannes Eidesgaard sigur, at tað er hansara fatan, at vit eiga at fara so sera varisliga fram, tá vit tosað um hasi fyribrigdini.

– Fyri tað fyrsta eiga vit at seta okkum spurningin um tað er neyðugt at privatiserað, og hvør ið tað er, sum fær gagn av privatiseringini, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann sigur, at tað eftir hansara meting er trupult at síggja nakað positivt í at útlisitera ein stovn, sum er væl rikin, og tað argumentini fyri útlisiteringini skulu vera sera góð.

– Men hetta skal ikki skiljast, sum vit eru ímóti bara fyri at vera ímóti, leggur hann afturat.

Jóannes leggur afturat, at hann heldur, at tað skal vera púra greitt, hvør tað er, sum far fyrimunin av privatiseringini - um tað er tað almenna, ella um tað er tann fyritøka, sum yvirtekur uppgávuna.

### Landið er so lítið

Ein orsøk til varsemi Jóannesar er, at landið er so lítið, sigur hann.

– Í Danmark er ein rúgva av privatum fyritøkum, sum bjóð-a upp á almennu uppgávurnar, men vit kunnu í fleiri førum vænta, at tað bert verður tann eina. Tá er tað ein spurningur um hvussu stórur vinningurin er fyri tað almenna, sigur Jóannes.

Tí heldur hann, at myndugleikarnir eiga at gera eina ella aðra mátingarskipan, sum ger greitt hvussu stovnurin virkar nú, og sum eisini kann brúkast tá gerast skal upp, hvør vinningurin skal verða, skal stovnurin - ella tænastan - útlisiterast ella privatiserast.

Og hóast ikki heilt samdur við landsstýrismannin, so heldur Jóannes tað vera á góðari leið, at kjakið um privatiseringar og útlisiteringar verður tikið upp nú, tí hugtøkini eru ógvuliga nógv frammi í tíðini.

– Hesi hugtøkini taka myndugleikan frá politikarunum og tað eru dømi, sum vísa at privatisering ikki var rætta leiðin, sigur Jóannes og vísir á Skotlandssiglingina, sum eitt heimligt dømi og bretska vatnverkið, sum eitt útlendskt dømi um miseydnaða privatisering.



# Málið er als ikki viðgjørt

*Karl Heri Joensen, býráðslimur í Klaksvík, gjørdist ikki sørt ovfarin, um viðmerkingarnar, sum borgarstjórin, Jógvan við Keldu, hevði um ætlanir Landsbankans um eina møguliga endurfígging av føroysku kommunuskuldini*



*Karl Heri Joensen gjørdist ikki sørt skelkaður, tá býráðsformaðurin í Klaksvík segði, at eitt samt býráð ikki tók undir við ætlanum Landsbankans*

JÁKUP MØRK

Í hósdagsútgávu okkara skrivaðu vit, at Landsbankin og Unibank seinastu tíðina hava arbeitt við eini møguligari umfíggjan av føroysku kommunuskuldini.

Ætlanin við hesum var, at nýtt felag skuldi stovnast, sum við hjá av lánsbrøvum skuldi endurfíggja føroysku kommunuskuldina.

Landsbankastjórin, Sigurd Poulsen, segði tá við Sosialin, at skuldi ætlanin gerast veruleiki, var alneyðugt at stóru kommurnar vóru við í hesum, soleiðis at samlaða peninganøgdin gjørdist nóg stór.

### Jógvan sigur ósatt

Til hetta segði Jógvan við Keldu, býráðsformaður í Klaksvík, at Klaksvíkar býráð hevði eina greiða støðu í hesum máli. Hann greiddi frá, at býráðið var komið ásamt um, at teir ikki vildu vera við í eini slíkari loysn. Hinvegin varð avgjørt, at kommunan í beinleiðis samstarvi við lánveitararnar skuldi greiða málið, og at einki millumlið skuldi vera í hesum sambandi.

Karl Heri Joensen, sum situr í andstøðuni í býráðnum, sigur við Sosialin, at hann gjørdist ikki sørt skelkaður, tá hann las greinina, tí honum kunnugt hevur málið ongantíð verið til viðgerðar í býráðnum.

- Tá Jógvan við Keldu sigur við Sosialin, at býráðið hevur eina greiða støðu í málinum, er hetta beinleiðis ósatt, sigur Karl Heri Joensen. Hann leggur afturat, at honum kunnugt, hevur einki umboð hjá býráðnum somikið sum verið á fundi við Landsbankan í hesum máli.

Andstøðulimurin finst sostatt hvassliga at, at býráðsformaðurin úttalar seg vegna býráðið, uttan at málið hevur verið til viðgerðar.

### Mugu kanna møguleikarnar

Karl Heri Joensen heldur annars, at tað er skyldan hjá býráðnum at kanna allar møguleikar, sum kommunan hevur, í sambandi við, at kommunuskuldaravtalan fer úr gildi 30. november í ár.

Eftir hansara tykki kann Klaksvíkin ikki á nakran hátt loyva sær at seta seg sjálva uttanfyri eini møguligari loysn, men eigur býráðið hinvegin at vera opið yvir fyri teimum loysnum, sum Landsbankin hevur at bjóða. Endaliga niðurstøðan má so vera tann, sum tænir best.

- Klaksvíkar Kommuna er á ongan hátt somikið væl fyri, at vit kunnu loyva okkum at taka av einum fíggingartilboði, uttan at vit fyrst hava kannað allar møguleikar. Talan er her um eina avgerð, sum hevur alstóran týdning fyri framtíðina og fíggjarligu dispositiónsmøguleikarnar hjá Klaksvíkini, og tískil er neyðugt, at býráðið ger nýtslu av øllum tí fólki, sum kommunan hevur, og, um tað er neyðugt, fær hjálp frá serkunnleika uttan fyri kommununa, sigur Karl Heri Joensen

### Skilagott við serkunnleika

Torleif Sigurðsson, sum eisini situr í andstøðu í býráðnum sigur við Sosialin, at hann er samdur í tí, sum Karl Heri Joensen førir fram.

-Mær kunnugt hevur málið ongantíð verið viðgjørt í býráðnum, og heldur í fíggjarnevndini, har eg eri limur, sigur Torleif.

eftir hansara tykki er tað avgjørt skilagott, um kommunan tekur serkunnleika við upp á ráð, tá slíkar avgerðir skulu takast.

Í hesum sambandi sigur hann eisini, at ein skuldi trúð, at serkunnleikin, sum í hesum føri er Landsbankin, er betri førur fyri at taka eina støðu til málið, enn vanligu leikmenninir, í hesum føri býráðslimirnir.

-varð serkunnleikin tikin upp á ráð í sínari tíð, tá fleiri stór og dýr lán vórðu tikin, er als ikki víst, at øll hesi lán vórðu upptikin, sigur Torleif Sigurðsson at enda.

Í fyrstu atløgu hevur andstøðan gjørt av, at borgarstjórin á fyrstkomandi býráðsfundi skal geva býráðnum eina frágreiðing um mannagongdina í málinum, og harumframt ætlar andstøðan at krevja, at býráðið í víðari mun kann møguleikarnir fyri eini framtíðar fígging.

# Býráðið er kunnað í málinum

*Borgarstjórin í Klaksvík, Jógvan við Keldu, sigur seg alla tíðina hava arbeitt eftir býráðssamtykt*

JÁKUP MØRK

Tá vit spurdu bogarstjóran í Klaksvík, Jógvan við Keldu, um hansara støðu til omanfyrinevndu atfinningar, gjørdi hann púrasta greitt, at hann als ikki er samdur við andstøðuni í hesum.

Vísandi til býráðssamtykt frá 27. januar 1999 greiddi borgarstjórin frá, at eitt samt býráð tá gjørdi av, at Klaksvíkar Kommuna skuldi gera krav upp á sítt innistandandi í kommunala kreppulánsgrunninum, eftir at ein eingangsupphædd var útgoldin ringast støddu kommununum.

Samtyktin tað ferðina bygdi á tilmæli frá fíggjarnevndini, sum hevði havt málið til viðgerðar 13. januar.

### Valár er í ár

Sum nevnt varð hetta samtykt fyri góðum ári síðani, og borgarstjórin sigur seg alla tíðina hava hildið seg til arbeiðssetningin hesum viðvíkjandi.

Hann leggur afturat, at hann javnan hevur kunnað býráðið um støðuna í málinum, seinastu ferð 14. desember 1999, og ongantíð hevur nakar mótmælt tí arbeiði, sum er farið fram í málinum higartil.

-Tískil metti eg, at tað var greið semja í býráðnum um, at kommunan sjálv avgreiður síni lániviðurskifti, sigur Jógvan við Keldu.

-Alt gongur í friðartíð, sigur borgarstjórin, sum við hesum sipar til at talan í ár er um valár, og andstøðupolitikararnir tískil helst vilja manifestara seg. Sjálvur vil hann tó ikki hava ákærurnar sitandi á sær, og ger hann tí greitt, at hann hvørki hevur logið ella dult nakað fyri andstøðuni.

Jógvan við Keldu sigur at enda, at málið verður lagt fyri á býráðsfundi í komandi viku, soleiðis at endalig greiða fæst á málinum.




